## Gera seg inn á busskýlir

HERVERK
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Løgreglan í Eysturoy leitar eftir ótangum, sum stundum hava til fragd at gera seg inn á busskýlini í oynni.

Kristian Martin Joensen, sýslumaður, sigur, at seinasta herverkið er framt á busskýlið við Gøtugjógv, har rútarnir eru brotnir.

– Tað vísir seg, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki í oynni.

Hann sigur, at rútarnir í einum slíkum skýli eru dýrir, og hann sigur seg hava skilt, at umvælingin av busskýlinum við Gøtugjógv kostar einar 6.000 krónur.

– Tað er jú púrasta meiningsleyst at gera seg inn á hesi skýlini, heldur sýslumaðurin.

Hann sigur, at løgreglan vil fegin frætta frá fólki, sum vilja hjálpa teimum at finna út av, hvørjir ótangarnir eru, sum ikki kunnu lata skýlini í oynni fáa frið.

– Vit vita ikki, hvørjir ótangarnir eru, men vit vita, at hetta er ein afturvendandi trupulleiki. Tí vilja vit fegin frætta, um onkur veit okkurt at siga okkum, sum vit ikki vita, sigur Kristian Martin Joensen.

## Brutu átta rútar á flakavirkinum

HERVERK
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Leygarkvøldið var dansur og nógv fólk í Roynhøllini í Hvalba.

Tá ið náttin hasaði av, vóru átta rútar færri heilir á flakavirkinum í Hvalba.

Løgreglan í Suðuroy sigur, at onkur hevur gjørt seg inn á virkið sunnunáttina, og átta rútar eru knústir.

Hetta eru alt termurútar, og teir eru dýrir.

– Vit kunnu ikki siga, at vit eingi spor hava at ganga eftir, men fólk, sum kanska vita eitt hvørt um tilburðin, eru vælkomin at venda sær til okkara, sigur løgreglan.

Í Suðuroy var annars friðarligt í vikuskiftinum.

– Okkurt minni ferðsluóhapp var, men annars gekk ferðslan væl, sigur løgreglan í Suðuroy.

# Álit um undirsjóvartunnil undir Tangafirði

**Borgarstjórin í størstu kommununi við Skálafjørðin, Rodmundur Nielsen, sigur, at higartil er einki komið fram í málinum um undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym sum ger, at ætlanin er vorðin minni áhugaverd. – Skulu kommunurnar verða við í hesi ætlan, er sjálvsagt neyðugt, at eitt so stórt mál verður umrøtt bæði væl og virðiliga, sigur hann**



*– Eg haldi, at prinsippið um tunnilssamband millum Skálafjørðin og Suðurstreym er ógvuliga áhugavert, sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

UNDIRSJÓVARTUNNIL
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Hugskotið um undirsjóvartunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym, sum varð lagt fram á fundi á Toftum fyri fitt av tíð síðan, er á ongan hátt slept enn. Bólkurin, sum kunnaði um hesa ætlan, hevur arbeitt við málinum síðan, og nú nærkast eitt álit, sum í fyrsta lagi verður lagt fyri kommurnar við Skálafjørðin.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, sigur, at kommunurnar við Skálafjørðin vænta, at eitt álit í málinum fer at fyriliggja nakað út í desember í ár.

– Umboð fyri okkara kommunu vóru við á fundinum á Toftum, og vit hildu, at ætlanin, sum bólkurin legði fram, er sera áhugaverd.

Hann vísir á, at síðan henda framløgufundin, eru kommunurnar við Skálafjørðin javnan kunnaðar um gongdina í málinum, og nú bíða tær spentar eftir einum áliti í málinum.

Teir, sum manna bólkin, sum gongur á odda í ætlanini um tunnilssamband millum Skálafjørðin og Suðurstreym, eru Símun Johannesen, bygdaráðslimur í Nes kommunu, Martin V. Heinesen, jarðfrøðingur, Tummas Eliasen, stjóri á Føroya Lívstrygging og Niclas Foldbo, verkfrøðingur, ið hevur fingist nógv við tunnilsbyggingar.

Sosialurin royndi at fáa eina viðmerking um ætlaða álitið frá einum av hesum fýra í gjáramorgunin, men tað eydnaðist tíverri ikki.

### Spennandi ætlan

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri, heldur, at ætlanin um tunnilssamband millum Skálafjørðin og Suðurstreym er ógvuliga áhugaverd.

– Tað kostar pening at gera eitt slíkt álit, og tí hava kommunurnar við Skálafjørðin sett nakrar krónur av til endamálið.

Borgarstjórin sigur, at higartil er einki komið fram í málinum sum ger, at ætlanin er vorðin minni áhugaverd.

– Skulu kommunurnar verða við í hesi ætlan, er sjálvsagt neyðugt, at eitt álit fyriliggur. Síðan verður eitt so stórt mál sum hetta umrøtt bæði væl og virðiliga.

Rodmundur sigur seg hava stórt álit á teimum, sum arbeiða við hesi ætlan.

– Eg var eisini við á Toftum, tá ið ætlanin varð framløgd, og eg haldi, at prinsippið um tunnilssamband er ógvuliga áhugavert, sigur borgarstjórin í størstu kommununi við Skálafjørðin.

# Valfundir á Skálafjørðinum

**Nú kommunuvalið stundar til, verða í minsta lagi tríggir valfundir á Skálafjørðinum í hesi vikuni. Ein verður á Glyvrum, ein á Strondum og ein á Skála**

VALFUNDIR
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo



*Síðsta mikukvøld skipaðu kvinnurnar fyri valfundi í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tríggir listar eru til valið í nýggju og komandi Runavíkar kommunu, sum veksur við trimum kommunum 1. januar 2005.

Skála kommuna, Oyndarfjarðar kommuna og Elduvíkar kommuna leggja sum kunnugt saman við Runavíkar kommunu, tá ið hetta valskeiðið, sum nú nærkast endanum, er liðugt.

Hetta merkir, at tey, sum stilla upp í kommununum, sum nú koma uppí Runavíkar kommunu, stilla upp til val í somu kommunu sum onnur valevni í kommununi.

Tríggir listar stilla soleiðis upp til val í Runavíkar kommunu hesaferð. Ein listi er við valevnum úr Æðuvík og Rytuvík og heilt inn til Lambar. Hetta er ein sonevndur Runavíkar-listi. Søldfirðingar og fólk á Skipanesi hava sín egna lista. Síðan er tað sonevndi Skála-listin, sum eisini fevnir um bygdirnar í núverandi Oyndarfjarðar-og Elduvíkar kommunu.

### Valfundir

Mikukvøldið komandi kl. 19 verður almennur valfundur í fimleikarhøllini í Glyvra skúla, og fríggjakvøldið klokkan 19 verður valfundur í skúlanum á Skála.

Laura Olsen, sum saman við orðstýraranum, Hilmari Jan Hansen, skipa fyri fundinum á Glyvrum, sigur, at tey á fyrsta sinni skipaðu fyri einum tílíkum valfundi undan seinasta vali.

– Nøgv fólk komu at lýða á, og hetta var ein góður fundur.

Hon vónar, at undirtøkan verður eins góð hesaferð.

– Fundurin verður skipaður soleiðis, at valevnini fáa tveir minuttir í part til framløgu. Síðan verður spurnarorðaskifti, har fólk fáa høvi at seta spurningar, og at enda sleppa valevnini at taka saman um.

Laura Olsen sigur seg vóna, at valevni og áhoyrarar møta fjølment til valfundin á Glyvrum.

Fundurin á Skála verður skipaður á nøkulunda sama hátt sum á Glyvrum, og eisini her verður Hilmar Jan Hansen orðstýrari.

### Á Strondum

Eisini í Sjóvar kommunu verður valfundur í hesi vikuni.

Av Strondum frætta vit, at fundurin verður í Bygdarhúsinum á Strondum hóskvøldið klokkan 19.

Í Sjóvar komunu vóna tey eisini, at nógv fólk møta til fundin hetta kvøldið.



Tórbjørn Jacobsen:

# Tað ringasta sum kundi henda

**Tey hørðu hjørtuni vildu ikki taka ímóti mínari útrættu hond, sigur Tórbjørn Jacobsen**

FLOKSÓSEMJA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



*– Hóast eg eri koyrdur úr tjóðveldisflokkinum, fari eg at møta á tingi sum vanligur tingmaður oghar farið eg at føra veruligan tjóðveldispolitikk, sigur Tórbjørn Jacobsen*

– Eg royndi at rætta hondina út fyri at fáa semju. Men tað kláraðu tey hørðu hjørtuni í flokkinum ikki at taka ímóti.

Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, sigur, at tað er onki, hann kann gera við avgerðina hjá Tingmanningini um at koyra hann úr flokkinum á tingi.

Men hann heldur, at hetta var tað ringasta, sum kundi henda fyri flokkin.

Men tað er nógv í málinum, sum hann ikki skilir. Eitt nú skilir hann ikki, hvat aðalstjórnin hevur við tingmanningina at gera.

– Hetta var tað ringasta, sum kundi henda, tí hetta skaðar flokkin almikið og eg skilji ikki, at fáfongdin hjá summum flokslimum kann vera so sterk, at teir eru til reiðar at skaða flokkin fyri at fáa sítt ígjøgnum.

Men nøvn vil hann ikki nevna.

Hann dugir ikki at skilja, at eitt mál ímillum persónar skal viga so nógv, at tað endar við eini ekslusión.

Sjálvur metir Tórbjørn Jacobsen seg eisini hava verið fyri persónsálopi, tí í Dimmu mánadagin er Karstin Hansen endurgivin fyri at siga, at Tórbjørn er ikki megnar at umsita seg sjálvan.

– Er tað ikki persónsálop av tí grova, spyr Tórbjørn Jacobsen.

### Fer at stríðast sum ongantíð fyrr

Annars boðaði sjónvarpið frá mánakvøldið, at Tórbjørn Jacobsen fór at biðja um farloyvi í tinginum fyri at forða fyri, at flokkurin fór í tviningar.

– Hetta er eitt persónsmál, sum órógvar allan flokkin og eg helt, at tað kundi loysast við at annar parturin tók seg aftur í eina tíð fyri at fáa frið í flokkinum aftur.

Men tað verður nú av ongum.

– Eg bað um farloyvi fyri at forða fyri, at flokkurin fór í tvíningar. Tað var í vónini um, at tíðin kundi lekja sárini, so at vit aftur kundu finna saman um nakrar vikur, ella mánaðir.

– Men nú tingmanningin hevur samtykt at koyra meg út, gevur tað als onga meining at fara í farloyvi.

Tórbjørn Jacobsen vísur eisini aftur tí, sum flokkurin sigur um, at hann skal hava fingið eina fráboðan um støðuna.

Í gjáramorgunin hevði hann onki frætt.

Men hann vísur á, at tað eru bara fimm av átta tinglimum, sum hava atkvøtt fyri at koyra hann úr flokkinum og tað heldur hann er ein veik støða.

Tórbjørn Jacobsen sigur stendur tað við, at hann er koyrdur úr flokkinum, fer hann sostatt at møta á tingi sum vanligur tingmaður.

– Og har farið eg at vera so virkin, sum ongantíð fyrr og har fari eg at føra veruligan tjóðveldispolitikk, soleiðis sum hann m.a. kom til sjóndar í fyrstuni, tá ið Høgni Hoydal varð formaður, tá ið farið var undir skipaðu loysingina. Hesin politikkur varð jarðaður eftir valið á heysti í 2000 og ongantíð reistist aftur.

Eftir hansara tykki hevur hevur tjóðveldisflokkurin partvís slept tjóðveldispolitikkinum á gólvið.

– Tjóðveldispolitikkurin hjá flokkinum endaði við einum málsetningi um at yvirtaka skrásett parlag og tað er hetta, sum eg fari at royna at fáa aftur á beint.

*– Tú hevur boðað frá, at tú hevði nakrar politiskar hondgranatir liggjandi í skápinum, sum tú fór at bresta, gjørdust tað neyðugt?*

– Tað fer tíðin at vísa!

*– Fert tú at stilla uppaftur fyri tjóðveldisflokkin?*

– Fái eg eina áheitan frá valfelagnum, fari eg at stilli eg uppaftur, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Og hann leggur afturat, at hann hevði ikki havt trupulleikar at siti á tingi saman við Høgna Hoydal aftur, um so skuldi verið.

– Eg dugi ikki at síggja tað stóra í hesum máli, so tað skal ikki skorta upp á vilja frá mær til at finna stevið aftur.

# Antin fór Tórbjørn ella pakkaði Høgni saman

**Hevði Tórbjørn Jacobsen ikki farið úr tjóðveldisflokkinum á tingi, hevði Høgni Hoydal fari frá sum formaður, tí hesum kundi hann ikki liva við**

FLOKSÓSEMJA
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



*Høgni Hoydal var til reiðar at taka seg aftur, fekk hann ikki undirtøku fyri at koyra Tórbjørn Jacobsen úr tjóðveldisflokkinum, tí hann heldur, at Tórbjørn var farin út um alt mark*

– Hesum kundi eg ikki liva við. Fór Tórbjørn Jacobsen ikki, hevði tað sostatt fingið aðrar avleiðingar.

Tað sigur Høgni Hoydal, formaður tjóðveldisfloksins.

Og tað gekk, sum formaðurin vildi, tí mánakvøldið varð Tórbjørn Jacobsen koyrdur úr tjóðveldisflokkinum á tingi.

Sjálvur sigur tjóðveldisflokkurin, at Torbjørn Jacobsen hevur sett seg uttanfyri tingmanningina.

Men úrslitið er tað sama, tí Tórbjørn Jcaobsen er undir øllum umstøðum liðugur í tjóðveldisflokkinum.

Í hvussu so er til løgtingsval verður aftur.

Tey, sum hava fylgt við gongdini, vita, at upprunin til hesa víðgongdu avgerð, er, at Tórbjørn Jacobsen skrivaði tvey lesarabrøv í Sosialinum, har hann legði hart eftir floksformanninum. Hann kallaði hann ein lítlan messias og hann segði, at var Høgni Hoydal rætt endurgivin í eini grein um skrásett parlag, var hann heimsmeistari í manipulatión.

Hesum kundi Høgni Hoydal ikki liva við. Tað endaði hóskvøldið við eini semju í flokkinum, at Tórbjørn Jacobsen harmaðist skrivingina og viðgekk, at hon var farin av kós.

Í semjuni stendur eisini, at ta tingfólk ið fremur persónsálop á annað tingfólk í fjølmiðlunum, hevur sett seg uttanfyri tingbólkin.

Hetta tulkaði Útvarpið sum at hann hevði biðið um umbering og hevði tikið alt í seg aftur.

Og ta fekk Tórbjørn Jacobsen til at geva ilt av sær í Rás 2 og í Dimmmalætting og halda fast um, at hann hevði hvørki biðið um umbering ella hevði tikið nakað aftur.

Í Dimmu er hann eisini endurgivin fyri at draga dómin ímillum Team 85 og tjóðveldislfokkin upp í málið og nevnt hetta sum eitt feskt dømi um, hvussu manipulerandi Høgni Hoydal er.

Aftaná bað hann kortini alment um treytaleysa umbering fyri tað, Dimma endurgevur hann fyri at siga um Team-85 dómin, tí tað var ikki ætlað at fara í blaðið.

Men hendan umberingin hevur ikki fingið tingmanningina hjá tjóðveldisflokkinum at blotna.

Á fundi mánadagin samtykti ein meiriluti av tingmanningini at halda fast um semjuna, um semjuna um, at tinglimur, ið leypir á annan tinglim í flokkinum, hevur sett seg uttanfyri tjóðveldisflokkin á tingi.

Sostatt metir tingmanningin, at Tórbjørn Jacobsen hevur tikið seg úr tingmanningini við sínum viðmerkingum í Dimmu og Rás 2 um vikuskiftið.

Hesi boðini fekk aðalstjórnin hjá tjóðveldisflokkinum mánakvøldið og aðalstjórnin hevur síðani tikið tað til eftirtektar, boðar flokkurin frá í tíðindaskrivi.

Flokkurin sigur eisini, at Tórbjørn Jacobsen fekk boðini mánakvøldið.

Samstundis fer Aðalstjórn tjóðveldisfloksins at kalla inn til eykafloksting leygardagin hin 20.11.2004, at viðgera politisku støðuna.

Har skal eisini næstformaður Tjóðveldisfloksins veljast.

Karsten Hansen er valdur til næstformann fyri tjóðveldisflokkin á tingi eftir at Tórbjørn Jacobsen tók seg aftur og tað er vanligt, at sami tinglimur eisini verður næstformaður í sjálvum flokkinum Tingmanningin var ikki samd um at koyra Tórbjørn úr flokkinum. Høgni Hoydal vil ikki siga, hvørjir tinglimir vóru ímóti at koyra Tórbjørn úr flokkinum, men vælvitandi keldur í flokkinum siga fyri Sosialinum, at tað vóru Finnur Helmsdal og Páll á Reynatúgvu, sum ikki vildu, at Torbjørn skuldi koyrast.

Finnur Helmsdal hevur als ongar viðmerkingar og tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á Páll á Reynatúgvu.

Men úrslitið er, at tað vóru sostatt fimm av teimum átta tinglimunum, sum gjørdu av at koyra Tórbjørn úr flokkinum.

Høgni Hoydal sigur, at um Tórbjørn Jacobsen so stillar uppaftur á næsta vali, er ein spurningur ímillum Tórbjørn Jacobsen og lokalfelagið hjá flokkinum.

### Hevði fingið avleiðingar

Formaðurin í tjóðveldisflokkinum sigur at hjá sær var ongin trupulleiki at taka avgerðina um at koyra Tórbjørn úr flokkinum.

– Hjá mær var skrivingin hjá Tórbirni langt síðani farin út um alt mark, sigur Høgni Hoydal.

*– Men fekst tú ikki undirtøku fyri at fáa Tórbjørn Jacobsen úr flokkinum, hevði tú so sjálvur farið frá?*

– Tað kann ein og hvør gita sær til. Eg kundi ikki liva við hesum. Flokkurin hevur bíðað alt ov leingi við at taka støðu í málinum og tók flokkurin ikki støðu nú, hevði tað sjálvsagt fingið avleiðingar, sigur Høgni Hoydal.